# Landsgrannskoðanin
## søkir eftir starvsfólki

Talan er um áhugavert og fjølbroytt starv, sum fevnir um grannskoðan av almennum stovnum, skipanum og virkjum. Í ávísan mun ber til at laga arbeiðsuppgávur eftir førleika og áhuga. Nærri fæst at vita um starvið á tlf. 315111.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar hava fyrimun, um teir hava útbúgving ella royndir innan grannskoðan, roknskap, løgfrøði o.l. Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur og dugir væl at skriva.

**Útbúgvingar- og eftirútbúgvingarmøguleikar:**
Vit kunnu bjóða góðar sømdir í sambandi við útbúgving og eftirútbúgving, harundir luttøku í internum og eksternum skeiðum.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Sambært viðkomandi sáttmála við Fíggjarmálastýrið.

**Umsókn:**
Umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til: Landsgrannskoðanin, J. Paturssonargøta 9, Postrúm 376, 110 Tórshavn. Umsóknarfreistin er 26. apríl 2000.

**Landsgrannskoðanin** er stovnur undir løgtinginum, sum virkar sambært Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Landsgrannskoðanin hevur til endamáls at grannskoða landsroknskapin, sum fevnir um inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini umframt ogn og skuld landsins. Eisini fyrireikar og avgreiðir Landsgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar.

# Havnameistari til Sørvágs Havn

Søkt verður eftir havnameistara til Sørvágs Havn.

Kravdir eginleikar: Arbeiðssemi og nærlagni og harafturat er tað ein treyt at hava navigatørútbúgving.

Starvssetanin, arbeiðstíðin, løn og frítíðarskipan verða sambært sáttmála millum Føroyar Skipara- og Navigatørfelag og Sørvágs Kommunu.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Meira fæst at vita um arbeiðsøki og nærri arbeiðsásetingar við at venda sær til skrivstovuna tlf. 332004/333122.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum við frámerki: »Umsókn havnameistari« skulu vera Sørvágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 25.04.2000 kl. 12.00.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

**Sørvágs Kommuna**

# Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn

Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst til setan tann **01. juni 2000** ella so skjótt sum til ber.

**Krøv:** Útbúgving sum navigatørur somuleiðis sum góður kunnleiki til enskt er ein treyt.

Lønar- & arbeiðstreytir verða sambært sáttmála millum Fuglafjarðar býráð og Føroya Skipara- & Navigatørfelag frá 05. juni 1997.

Starvið verður lønt sambært lønartalvuni fyri havnaumsjónarmenn.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristian Oluf Christiansen, havnameistara á telefon 444056 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum møguligum viðmælum skulu vera **Fuglafjarðar kommunu** í hendi í seinasta lagi mikudagin **26. apríl 2000 kl. 16.00.**

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

Fuglafjørður, tann 06. apríl 2000

**Fuglafjarðar býráð**

Toll- og Skattstova Føroya

# Innkrevjing av almennari skuld

Innkrevjingin av almennari skuld er løgd út til økisskrivstovurnar at umsita.

Talan er um eftirstøðu í skatti, mvg, barnapeningi o.ø.

Tey, ið hava spurningar um innkrevjing, skulu venda sær til ta økisskrivstovu hjá Toll- og Skattstovuni, sum tey hoyra til.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Útróðrarbátur til sølu

M/B Havfari 32 ton og egningarskúrur á Stongunum við 120 svøvla línum og 10 aut. snellum, fiskiloyvi í bólki 4a, 30 dagar á Føroya Banka, snelluloyvi í Íslandi, til sølu fyri 950.000 kr.

**Tlf. 457735**

# Útbjóðing

Vegna Kollafjarðar kommunu verður arbeiðið at gera eina 100 m langa bryggju á Langasandi í Kollafirði boðið út í almennari lisitatión.

Bryggjan verður gjørd úr stálspunsi og skal hava alla vanliga útgerð so sum pullartar, vatn og el.

Við til arbeiðið hoyrir útspreinging fyri víðkan av Kollafjarðar skúla, haðani grótið til uppfylluna í bryggjuna skal takast.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá Landsbyggifelagnum, har tað verður útflýggjað móti eini kvittan um, at kr. 2.000,- eru settar á konto nr. 1544111 í Føroya Banka.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Bryggja í Kollafirði« skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinasta lagi 16. mai 2000 kl. 14.[00].

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 16. mai kl. 14.[00].

**Landsbyggifelagið P/f**
Grønlandsvegur 5
Postboks 228 · FO-110 Tórshavn

# Fyristøðufólk

Søkt verður eftir fólki at fyriskipa vaskingina umborð á NORRÖNU, meðan hon liggur á Havnini í tíðarskeiðnum 15.05. til 08.09.00.

Tíðirnar eru hesar:
Mánadag 06:00–08:30
Mikudag 15:00–18:00
Fríggjadag 06:00–08.30

Tann, ið settur verður, skal biðja tað fólk, ið krevst.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2000.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Jónfinn á tlf. 345900.

**P/F SMYRIL LINE**
**Postsmoga 370**
**110 Tórshavn**

# Samband

Kærleiksfullur og róligur hampamaður mitt í fýratiárunum ynskir samband við fitta og álítandi kvinnu í hóskandi aldri.

Havi gott starv og góð livikor annars.

Skriva mær trygt nøkur orð, gjarna við mynd, tó eingin treyt. Latum okkum so møguliga seinni hittast á einum hugnaligum stað til eitt prát.

Lat ikki hendan góða møguleika gleppa tær av hondum. Full, treytaleys tagnarskylda.

**Bill. mrk. 16.77.**



Ledige stillinger for

# PRODUKTIONSMEDARBEIDERE

Arbeidet består i renskjæring, kvalitets kontroll og pakking av ferdigvarer.

Tarifflønn – minstelønn er 91,00 kr pr time. Vi skaffer bolig til de som ønsker det. Bedriften har egen pensjonsordning.

Søknadsfrist: 5. Mai 2000.

Nærmere opplysninger fås hos Durita Jakobsen tlf. 97706863 eller Grethe Lindberg Jenssen tlf. 78983431. Søknad sendes til Havprodukter AS, postboks B, 9990 BÅTSFJORD.

Havprodukter AS er en del av konsernet Nordic Sea Holding AS. Havprodukter AS er lokaliser til Båtsfjord i Øst-Finnmark, Norge og vi er 180 ansatte. Vi produserer i hovedsak frossen filet for eksport.

# Opið um páskinar

*Skírisdag 20/4 - STONGT*

*Langafríggjadag 21/4 - STONGT*

***Leygardagin 22/4 - OPIÐ sum vanligt***

*1. Páskadag 23/4 - STONGT*

*2. Páskadag 24/4 - STONGT*

***Týsdagin 25/4 - OPIÐ sum vanligt***

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara einar góðar páskir*

**frants restorff**

Sosialurin - 311820

# Frítíðaravloysarar til Postverk Føroya

Postverk Føroya søkir eftir summarfrítíðaravloysarum til postarbeiði/kassaavgreiðslu á hesum støðum:

Tórshavn
Kvívík/Leynum
Vestmanna
Fuglafirði
Gøtu
Leirvík



Umsøkjarar skulu hava útbúgving/royndir innan skrivstovuarbeiði.

Í summar verður eisini søkt eftir fólki til postútbering á hesum støðum:
Tórshavn
Argjum

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsóknir við viðmælum/prógvum verða at senda til:
Postverk Føroya
Postboks 3009
110 Tórshavn

í seinasta lagi tann 2 mai 2000

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Annu Katrinu Olsen
Tlf. 31 55 62 lok 144
anna.katrina.olsen@postverk.fo

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

*Vit útvega eftir tygara tørvi!*

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**SpF Teldu Tænastan**
**www.tt.fo**

**www.wenzel.fo**

Ford



**P/f Wenzel**

fk

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2983

**Navn:** Sp/f Fagralí›
**Adressa:** Vestara Bryggja, c/o Postboks 2145, 165 Argir.

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 13.04.2000
**Vi›tøkudato:** 13.04.2000
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Ruth Johannesen, Fagralí› 3, 100 Tórshavn
**Stjórn:** Mortan Sámal Jacob Martin Johannesen, Fagralí› 3, 100 Tórshavn
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** P/F Grannsko›aravirki› Inpact, R.C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 13.04.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og ídna› og a›ra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. apríl 2000

Kristin Balle

# Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy og Klaksvíkar HF-skeið

Frá 1. august 2000 er starv leyst at søkja í hesum lærugreinum:

**alis-/evnafrøði og teldufrøði**

Umsøkjarar við eini av omanfyri nevndu lærugreinum saman við aðrari lærugrein kunnu eisini søkja. Tímar eru leysir í **enskum, geografi, latíni, lívfrøði, støddfrøði og tónleiki**. Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF). YF-umsóknarbløð fáast frá skúlanum (tlf.: 44 40 24, faks: 44 47 97) ella frá Yrkisfelagnum.

Umsóknin skal **stílast til Føroya Landsstýri, Undirvísingar- og Mentamálastýrið, og vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000.**

Adr.: Studentaskúlin og HF-skeiðið
í Eysturoy
att.: Sámal í Skorini, rektari
Kambsdalur
530 Fuglafjørður

# 2. PÁSKAKVØLD VERÐUR KONSERT




**SJÓNLEIKARHÚSIÐ**
*Í HAVN*

**FRÁ KL. 22:00 – 03:45**